# Arbeiðsmegi á flakavirkjum

**Granskingardepilin fyri Økismenning hevur givið út eitt nýtt arbeiðsrit – Arbeiðsrit 11/2006 við heitinum "Arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini". Dennis Holm, samfelagsfrøðingur og Bogi Mortensen, siviløkonomur, hava skrivað arbeiðsritið**

TÍÐARRIT
*tíðindaskriv*

Seinastu ártíggjuni eru stórar broytingar farnar fram í føroyska samfelagnum sum heild, eisini á vinnuliga økinum. Moderniseringin og menningin av samfelagnum hevur ført við sær, at vinnumynstrið er broytt. Meðan tað fyrr vóru framleiðsluvinnurnar – serliga fiskivinnan á landi – sum vóru tær berandi, eru tað tey seinastu árini almennar- (og -privatar) tænastur og almenn umsiting, sum hava størstu framgongd og eru tær vinnur, sum krevja flest folk.

Minkandi tal av arbeiðsfólki innan framleiðsluvinnurnar er eisini ein gongd, sum hevur merkt Vesturheimin sum heild tey seinastu ártíggjuni. Ikki minst er gongdin styrkt eftir at tað er vorðið alsamt meiri vanligt at flyta framleiðslur til lond, har lønarkostnaðurin er væl lægri enn í Vesturheiminum.

Avbjóðingin fyri "tær gomlu" framleiðsluvinnurnar og fyri (lokal) samfelagið, sum hevur havt hesar vinnur sum kjarnuvinnur, er at tillaga seg til broyttu støðuna, til tær nýggju avbjóðingarnar, sum broytingarnar hava ført og koma at føra við sær. Hetta er eisini støðan í Føroyum.

Í arbeiðsritinum er foksu sett á evnið "arbeiðsmegin á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini" og roynir frágreiðingin m.a. at svara nøkrum spurningum í sambandi við hvørji arbeiðsfólkini á flaka- og fiskavirkjunum eru í dag, og hvørji vit kunnu vænta fara at manna hesi arbeiðspláss í framtíðini.

## Ein trupulleiki í eygsjón

Kanningar sum Granskingardepilin fyri Økismenning hevur gjørt – bæði tann millum arbeiðsfólk á flaka og fiskavirkjunum (í 2006) og ein kanning millum ung í 9. flokki og 3. flokki á miðnámsskúlunum (í 2003) – geva greiðar ábendingar um, at áhugin fyri at arbeiða innan fiskivinnuna á landi er minkandi.

Kanningin millum tey, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum, vísir, at nógv kundu hugsa sær annað arbeiði, hetta hóast trivnaðurin í vinnuni sum heild er góður. Tey sum ynskja annað arbeiði eru serliga tey, sum eru yngri enn 30 ár, men hetta er somuleiðis galdandi fyri ein part av teimum, sum eru í aldrinum 30-39 ár og 40-49 ár. Um kanningin verður brúkt sum grundarlag fyri eini umrokning (í mun til talið av lønmóttakarum innan fiskavøruídnaðin), so vísir kanningin, at 600-800 fólk (39% av 1500-2000 arbeiðsfólkum) á flaka- og fiskavirkjunum kundu hugsa sær at farið í annað arbeiði.

Kanningin vísir eisini, at foreldur (sum arbeiða í fiskivinnuni á landi), ynskja ikki, at børn teirra skulu fara at arbeiða í fiskivinnuni á landi. Við øðrum orðum, verandi ættarlið á flaka- og fiskavirkjunum ynskja ikki, at komandi ættarlið skal fara í somu vinnu sum tey.

Kanningin millum ung í 2003 vísir, at ung ynskja ikki at arbeiða í fiskivinnuni á landi. Bert 3,2% av teimum ungu ynskja, at fiskivinnan á landi skal gerast teirra framtíðar arbeiðspláss. Høvuðsorsøkin er, at tey ungu ynskja at taka eina útbúgving, sum gevur teimum møguleika at vinna meiri pengar og fáa eitt spennandi og fakliga avbjóðandi arbeiði.

Samanumtikið vísa kanningarnar báðar:

* Ein munandi partur av teimum, sum arbeiða á flaka- og fiskavirkjunum, ynskja annað arbeiði
* Verandi ættarlið á flaka- og fiskavirkjunum ynskja ikki, at komandi ættarlið / børn teirra skulu arbeiða í fiskivinnuni á landi.
* Tey ungu – komandi ættarlið á arbeiðsmarknaðinum – ynskja ikki at arbeiða í fiskivinnuni á landi.

## Stórar avbjóðingar

Hendan frágreiðingin gevur svar uppá fleiri áhugaverdar spurningar viðv. arbeiðsmegini á føroysku flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini. Men eins og aðrar frágreiðingar av hesum slagi, so setir hendan frágreiðingin eisini fleiri nýggjar spurningar, sum krevja viðgerð – í hesum føri bæði av vinnuni, fakfeløgum og frá politiskari síðu.

Ein týðandi partur av at menna einhvørja vinnu er at arbeiða við teimum avbjóðingum og hóttanum og møguleikum, sum vinnan hevur ella kann fáa. Niðurstøðurnar í Arbeiðsritinum *Arbeiðsmegin á flaka- og fiskavirkjunum í framtíðini* gevur ábendingar um at stórar avbjóðingar eru fyri framman, har tað er neyðugt at arbeiða miðvíst við at loysa tær avbjóðingar, sum eru og sum fara at koma í næstu framtíð.

Arbeiðsritið kann takast niður í pdf-formati á heimasíðuni hjá Granskingardeplinum fyri Økismenning – www.region.fo

Hóskvøldið 9. nov. frá kl. 20.30
Karaokekapping
- Glitnir bjóðar øllum at halda seg framat

• Fyrsta av sínum slag í Føroyum.
• Avmarkað luttakaratal
• Kappast verður í 3 umførum: hóskvøldini 9. nov., 16. nov. & 23. nov.
• Finalan verður fríggjakvøldið 1. des. kl. 22.30
• Tilmelding hjá Kenneth á tel 504334 el. Terja á tel 268889 ella støkk inn á gólvið.
• Aldursmark 18 ár!

Vinnarin fær eina vikuskiftisferð fyri 2 til Keypmannahavnar við Atlantic Airways. Tit búgva á Hotel Hilton. M.a. verður eisini jóla-borðhald á Rose – McGees.

Glitnir er einasta karaokebar í Tórshavn – við dygdargóðsku ert tú stjørnan!
Hvørt fríggjakvøld er KARAOKE kvøld í Glitni. Karmarnir um Karaoke í Glitni eru kanón: ljóð, stórskíggi og eitt syngjandi umhvørvi – karaoke í Glitni má upplivast.

GLITNIR
Gr. Kambansgøta 13 Tel 32 13 45 www.glitnir.org
Opið er:
mánadag - hósdag 12.00 - 23.00
fríggjadag 11.30 - 03.30
leygardag 13.00 - 03.30
sunnudag 13.30 - 23.00



TEAM85
ROYAL UNIBREW
ATLANTIC AIRWAYS
Föroya Bjór




STÝRIMAÐUR TIL NORRÖNU
Vilt tú verða í fyrstu røð í føroyskari skipa- og ferðavinnu?

Smyril Line søkir eftir 1. stýrimanni til Norrönu. Vit bjóða honum/henni eitt spennandi starv umborð á flaggskipinum í føroysku ferðavinnuni. Starvið er avbjóðandi og fjølbroytt, og tú fært ein góðan møguleika at verða við í framhaldandi menningini av Norrönu og Smyril Line – og harvið føroysku ferðavinnuni.

Títt komandi arbeiðspláss er eitt av størstu, bestu og nýggjastu skipum á Norðuratlantshavinum, og samstundis størsta skip føroyingar eiga. Hon tekur 1482 ferðafólk, 800 bilar og manningin, tá hon er mest, telur heili 118 fólk. Aftrat góðum starvstreytum bjóða vit hartil eina áhugaverda siglingarætlan, góða løn og góða frítíðaravtalu.

Førleikakrøv til 1. stýrimann:
• Skipsføraraútbúgving við minimum STCW áteknað vinnubræv sum stýrimaður av 1. stigi
• STCW áteknað GMDSS, GOC prógv
• Heilsu-, sløkkileiðara-, roykkavara-, trygdar-, Crowd Management-, bjargingar- og onnur bjargingar/førleika prógv
• Arbeiða sjálvstøðugt og góð samstarvsevnir.

Setanartreytir
Setanartreytir sambært sáttmála millum Skipara – og Navigatørfelagið og Reiðarafelagið.

Vit hugsa okkum, at tú hevur royndir frá ferðamannaskipum áður, men hetta er eingin treyt.

Umsóknir
Umsóknir við avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu sendast til:

SMYRIL LINE
Financial Controller
M/F Norröna
P.O Box 370
FO-110 Tórshavn

Umsøknir skulu verða okkum í hendi í seinasta lagi 8. novembur 2006 kl. 12.00.

Nærmari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Jørmund Vágadal á:
+298 34 49 92 ella
controller@norrona.fo

Smyril Line varð stovnað í 1982, og er í dag ein altjóða fyritøka við skrivstovum í Føroyar, Ísland, Noreg, Hetland, Skotland og Danmark um allan heimin. Umframt egnar skrivstovur, so hevur felagið eisini samstarvsfelagar í meginparinum av europeiska meginlandinum og restini av útheiminum.

SMYRIL LINE – EXPLORERS OF THE NORTH ATLANTIC

SMYRIL LINE · J. BRONCKS GØTA 37 · POSTBOKS 370 · FO-110 TÓRSHAVN
TLF 34 59 00 · FAX 34 59 50 · OFFICE@SMYRIL-LINE.FO · WWW.SMYRIL-LINE.COM